# Sosialurin

Nr. 106 • leygardagur • 7. juni 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo


Íslendski landsliðsvenjarin:

## Landaskomm vinna vit ikki

Reportasja úr Íslandi





2003, ár teirra brekaðu:

## Mál verða rokkin við hesum árinum

síða 5



## Áhugaverd bók um Larsen og Gasolin

Vikuskifti



Johan Páll er í døpurhuga:

## Vandi fyri at flakavirki stongja

Síða 8



Politisk inntriv í væntu:

# Bara taparar í verkfallinum

**Verkfallið hevur verið eitt bakkast fyri føroyskan búskap, og tað finnast bara taparar, heldur Anfinn Kallsberg løgmaður. Verkfallið vardi í ein mánað og gav verkafólkunum eina krónu og tíggju omaná tímalønina meira enn semingsuppskotið frá 8. mai, tá verkfallið byrjaði. Bjarni Djurholm landsstýrismaður fer longu í næstu viku at leggja eina ætlan fyri landsstýrið um at broyta viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum grundleggjandi**

Síða 6-7 og 11
















# Fýra vikur fyri níggju prosent

**Verkfallið er nú av, og nógv umstrídda verkfallið hevur givið føroysku arbeiðarafjøldini eina lønarhækkan áljóðandi sløk níggju prosent. Fleiri spyrja seg óivað, um verkfallið var tað vert**

VERKFALL
*Heri á Rógvi/Àki Bertholdsen*

Um midnáttarleitið hóskvøldið skrivaðu partarnir á arbeiðsmarknaðinum umsíður undir ein nýggjan sáttmála. Hósdagin hevði verkfall vart í samfullar fýra vikur.

Ùrslitið gjørdist ein lønarhækkan áljóðandi 8,53% yvir tvey ár. Lønin hækkar við 4,3 krónum beinanvegin í ár, og 1. mai í 2004 hækkar lønin aftur við 4,3 kr.

Eisini verða aðrar broytingar gjørdar, eitt nú í sambandi við setanarskriv til starvsfólk.

Alt verður lagt omaná grundlønina – eftirlønargjaldið verður tað sama komandi tvey árini. Hetta valdu arbeiðarafeløgini at gera, tá greitt varð, at partarnir fóru at semjast um 4,3 kr.

Aðrastaðni á síðuni sæst, hvussu lønin broytist komandi árini. Ùtrokningarnar eru gjørdar við støðið í grundlønini. Møguligar viðbøtur ella meirinntøka er ikki roknað við, tí hetta er ógvuliga misjavnt.



*Tað eydnaðist hesum báðum at halda somu linju alt verkfallið. Samstarvið hevur ikki verið betri. Tey settu samstundis sínar undirskriftar á nýggja sáttmálan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Vinningur?

Eitt verkfall í fýra vikur hevur sett síni spor hjá øllum. Verkafólkið í verkfalli hevur seinastu fýra vikurnar fingið munandi minni í sín part enn vanligt. Dagslønin hevur verið 596 kr. fyri ein persón í verkfalli, sum hevur gjørt sínar skyldur.

Hesin peningur er tikin úr verkfalsgrunni, ið limirnir sjálvir hava goldið inn til. Tískil gjalda teir sína egnu løn, sum eisini verður skattað.

Àðrenn verkfallið byrjaði varð eitt semingsuppskot lagt fyri partarnar. Lønin skuldi tveir ferðir økjast við 3,2 kr. um tíman. Hetta gav góð 6,8% í lønarhækkan yvir tvey ár.

Hetta vildi givið samanlagt 6.866 kr. minni yvir tvey ár, enn tann nýggi sáttmálin. Her verður roknað við grundløn og ongum viðbótum. Tapið í verkfalsdøgunum móti gamla sáttmálanum eru góðar 4.300 kr. Í mun til semingsuppskotið, var tað sáttmáli, er tapið góðar4.800 kr. Útfrá hesum gevur nýggin sáttmálin ein vinning, men síggja vit burtur frá verkfalspeninginum, sum limirnir sjálvir hava goldið inni, so gav hesin sáttmálin ikki nóg mikið til at dekka tapið í verkfallinum.

Sostatt loysti verkfallið seg ikki so væl útfrá tølunum. Men útfrá fakfelagsligum sjónarmiðum og øðrum argumentum, er myndin óivað ein onnur.

### Semja

Tað var semingsmaðurin, sum kallaði partarnar saman aftur, eftir áheitan frá landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm.

Og klokkan sjey hóskvøldið helt hann, at hann hevðu mýkt støðuna so mikið, at hann legði eitt semingsuppskot fyri partarnar.

Áðrenn samráðingarnar byrjaðu, høvu arbeiðarafeløgini tvíhildið um, at tey góðtóku onki minni enn fýra krónur afturat tímalønini í ár og fýra krónur afturat 1. mai næsta ár, umframt eina eftirløn uppá 1% um árið og tað svarar til eitt sindur minni enn 50 oyru afturat um tíman í ár og tað sama næsta ár.

Sostatt var kravið ein hækking uppá 4,50 krónur í ár og tað sama næsta ár.

Hinvegin hava arbeiðsgevararnar tvíhildið um, at lønarhækkingin skuldi í hvussu so er vera minni enn fýra krónur afturat tíman í ár og tað sama næsta ár, íroknað eftirløn.

Men sostatt var tað sum skilti partarnar, tá ið teir fóru til samráðingar í morgun, minni enn ein króna tilsamans yvir tvey ár, ella 50 oyru um árið.

Men tað gekk seint fyri seg, áðrenn nøkur endalig útmelding kom frá pørtunum. Dúgliga varð gitt og tulkað. Fólk vóru sum heild optimistisk, tí verkfallið hevði vart so leingi, og tað lá í luftini, at ein semja var í nánd.

Og seint út á kvøldið um tíggju tíðina komu tær fyrstu ábendingarnar um, at nú var ein semja funnin.

Og sum flest øll vita, so varð ein semja funnin, og verkfallið er av.

### Tvungin av alivinnuni

Boðini frá arbeiðsgevarunum, eftir at nýggjur sáttmálin var undirskrivaður, vóru, at teir vóru noyddir at skriva undir, orsakað av støðuni hjá alivinnuni.

– Vit kundu velja ímillum at verða skotin ella hongd. Vit hava goldið eitt loysigjald fyri alivinnuna, sigur Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Hann er ikki nøgdur við nýggja sáttmálan, sum hann sigur fer at fáa stórar fylgjur – bæði fyri vinnuna og samfelagsliga.

### Nøktandi

Hinvegin helt mótparturin í form av Vígdis Johannesen, forkvinnu í Havnar arbeiðskvinnufelag, at sáttmálin var nøktandi. Hon heldur ikki, at hetta er eitt heilt optimalt úrslit, men nøktandi kortini.

Og verkfallið hevur sambært henni verið vert tað nógva stríðið.

Hon fegnast eisini nógv um, at hennara egnu limir og feløgini øll hava staðið so væl saman í verkfallinum.

## Fakta

| | |
|---|---|
| Gamli sáttmálin | |
| Løn | 92.20 |
| Frítíðarløn | 11.06 |
| Eftirløn | 3.32 |
| Ùtgoldin tímaløn | 106.58 |
| Dagsløn | 852.67 |
| Vikuløn | 4,263.33 |
| Ársløn | 191,849.76 |
| Sáttmáli 1. Ár | |
| Løn | 95.40 |
| Frítíðarløn | 11.45 |
| Eftirløn | 3.43 |
| Ùtgoldin tímaløn | 110.28 |
| Dagsløn | 882.26 |
| Vikuløn | 4,411.30 |
| Ársløn* | 183,509.91 |
| Sáttmáli 2. Ár | |
| Løn | 98.60 |
| Frítíðarløn | 11.83 |
| Eftirløn | 3.55 |
| Ùtgoldin tímaløn | 113.98 |
| Dagsløn | 911.85 |
| Vikuløn | 4,559.26 |
| Ársløn | 205,166.88 |

*Minus dagar í verkfalli

# 9 milliónir afturút

**Nýggi sáttmálin tekur ein stóran part av vinninginum og harvið grundarlagnum undan flakavirkjunum, metir fíggjarstjórin, Leivur Michelsen**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Fíggjarstjórin hjá Føroya Fiskavirking var ikki nøgdur við sáttmálan, ið varð undirskrivaður hóskvøldið.

Leivur Michelsen er fíggjarstjóri hjá Fiskavirking og nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

– Vit kendu okkum sum gíslar í sambandi við støðuna hjá alivinnuni. Tískil vórður vit noyddir at skriva undir, sigur Leivur Michelsen.

Víst hevur fleiri ferðir á, at Føroya Fiskavirking kann koma at svíða fyri ein høgan lønarvøkstur, tí fyritøkan livir av útflutningi.

– Tað er lætt at rokna út. Vit høvdu beint yvir eina millión arbeiðstímar í fjør. Teir eru nú vorðnir níggju prosent dýrari, og hetta merkir eina meirútreiðslu upp á níggju milliónir, sigur Leivur Michelsen.

Føroya Fiskavirking kundi í fjør vísa á eitt yvirskot áljóðandi seytjan milliónir. Tískil skuldi Fiskavirking havt ráð til hetta, men so er ikki, sigur Leivur.

– Vit skulu hava eitt stórt yvirskot sum eitt so stór fyritøka. Hetta er ikki gott fyri okkum, sigur Leivur Michelsen.

Fólk á Fiskavirking eru so smátt farin aftur til arbeiðis. Hvussu teirra kundi vænta at verða uppsøgd ella líknandi, vil Leivur ikki siga nakað um.

– Tað er alt ov tíðliga at siga nakað. Vit koyra higartil sum vant, sigur Leivur Michelsen.

Spurdur, um hann heldur verkfallið var vert tað, sigur hann, at tað er ringt at siga, men upprunaligu krøvini hjá arbeiðarafeløgunum kundu als ikki góðtakast.

Annars vísir Leivur á, at hetta við tílíkum ikki ber til, og ein nýggj skipan má finnast.

– Vit tora ikki at gera so nógv í mai, tí eitt verkfall hóttir. Hetta ber ikki til í longdini, og vit mugu finna ein annan leist, har nakrar nýggjar meginreglur verða orðaðar, sigur Leivur Michelsen.



# Lyklapersónarnir í verkføllunum mugu skiftast út



*- Aðrastaðni verður tosað um tey viðurskifti, sum fáast skulu uppá pláss, í sáttmálaskeiðinum. Í Føroyum skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum at kalla altíð fram til eina striku við hóttanum um líkt og ólíkt. Teir hótta og troytta hvønn annan, til tey øll eru vorðin í ørviti. Slíkt er ein sagablott aðrastaðni, sigur Atli Hansen*

**- Alneyðugt er at eftirkanna verandi skipan bæði væl og virðiliga, sum við jøvnum millumbili førir okkum út í hesa ósiviliseraðu og avoldaðu støðuna. Samfelagið er meira kompliserað í dag enn fyri 50-100 árum síðan. Tað einasta, sum kemur burtur úr slíkum verkføllum, er, at ómetaliga stór virðir verða knúst. Hetta minnir um støðuna í Bagdad, sum fyrst skuldi knúsast og síðan byggjast uppaftur, sigur Atli Hansen, reiðari í Norðragøtu, sum eisini hevur sínar politisku royndir og royndir í donskum fakfelagsvirksemi**

VERKFALLIÐ AV
*Vilmund Jacobsen*

Atli Hansen heldur lítið um hetta verkfallið, sum nú er av. Hann er bersøgin og heldur, at lyklapersónarnir í hesum stríði eiga at verða skiftir út, og nýggj fólk eiga at taka um stýrisvølin.

- Lyklapersónarnir í hesum verkføllum eru sum vargur í seyðafylgi.

Verður vargurin ikki tikin, ber ikki til at røkja hagan, og hann fellir í órøkt.

Hann heldur, at tað verður samráðst í "eini slíkari muru", sum hann tekur til, at partarnir tola snøgt sagt ikki hvønn annan.

- Tað eru sjálvsagt limirnir sjálvir, sum avgerða, hvør stendur á odda í teirra feløgum, men við verandi fólkum og verandi skipan eri eg sannførdur um, at hetta er ein bági fyri samfelagið. Hetta hava vit longu so mong dømir um.

Atli sigur, at samfeløgini eru vorðin alt ov komplisera til, at nakað serligt spyrst burtur slíkum verkføllum - uttan tað vanlukkuliga, at ómetaliga stór samfelagsvirðir fara fyri bakka. Hetta tænir jú ongum endamáli.

- Tað eru fyrst og fremst tey, sum eru í verkfalli, ið verða rakt. Hesi eru ringast fyri, tí tey missa inntøku, meðan fólk annars eru til arbeiðis. Flestu kunnu "gardera" seg ímóti einum verkfalli, tí øll hava ein ella tveir frystarar í kjallaranum. Tí letur tað seg ikki gera at trýsta fólk til nakað sum helst við stongslum av ymiskum slagi.

Hann vísir á, at tað er ikki í dag, sum fyri 50-100 árum síðan, tá ið verkføllini kundu raka vanliga fólkið ógvuliga meint.

- Eg haldi tískil ikki, at tey, sum íbyrtu hetta verkfallið, vita, hvønn tað rakar. Her er eingin vinnari. Øll eru taparar. Tað einasta, sum spyrst burtur úr, er, at samfelagsvirðir verða knúst, og tað tænir heldur ikki teimum, sum eru í verkfalli. Støðan, sum verið hevur, minnir okkum á stríðið í Irak, har Bagdad fyrst verður bumbaður sundur og saman - fyri síðan at verða bygdur uppaftur. Hetta er skilaleyst.

Atli vísir á, at undir hesum verkfallinum eru ómetaliga stór virðir farin fyri bakka, sum annars kundu verið komin til sættis.

- Teir møguleikar, vit høvdu hendan mánaðin at virka og framleiða, eru burtur og koma ikki aftur. Hetta er mist inntøka, sigur hann.

Atli dugir tískil ikki at síggja, hvat endamálið er við slíkum verkføllum.

- Øll vita, at tá ið eitt verkfall sum hetta byrjar, fær tað eisini einaferð ein enda. Spurningur er bara um tíð, til onkur troyttast.

Hann sigur, at hetta er ein avoldað skipan, sum ikki verður brúkt í øðrum siviliseraðum londum longur.

- Aðrastaðni verður tosað um tey viðurskifti, sum fáast skulu uppá pláss, í sáttmálaskeiðinum. Í Føroyum skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum at kalla altíð fram til eina striku við hóttanum um líkt og ólíkt. Teir hótta og troytta hvønn annan, til tey øll eru vorðin í ørviti. Slíkt er ein sagablott aðrastaðni, sigur Atli.

Hann vísir á, at í øðrum londum hava tey bygt upp skipanir við eitt nú høvuðsavtalum og yvirornaðum reglum. Tey hava eisini ymiskar "prosedurur" og uratkvøður, soleiðis at tað ikki bara eru nøkur fá fakfelagsfólk, sum sita og taka avgerðirnar.

- Alneyðugt er at eftirkanna verandi skipan bæði væl og virðiliga, sum við jøvnum millumbili førir okkum út í hesa ósiviliseraðu og avoldaðu støðu, sigur Atli Hansen.


Síðani 1981 hevur alheims tænastu felagsskapurin Kiwanis virkað í Føroyum. Fyrstu tíggju árini við Kiwanis Tórshavn og síðani 1991 við Kiwanis Rósuni

**Týskvøldið 10. juni kl. 19.00 verður kunnandi fundur í Gøtu Arbeiðarafelag um Kiwanisfelagsskapin.**

Endamálið við fundinum, er at stovna Kiwanis Eysturoy leygardagin 14. juni. Sama vikuskifti hevur Gøta vitjan úr Vestmanraoyggjunum. Fótbóltsið, kiwanislimir og býráðsumboð koma saman at knýta Gøtu og Vestmanraoyggjar saman sum vinarbýir.

Hvat kanst tú fremja við limaskapi í Kiwanis?

1. Bøta um viðurskiftir í nærumhvørvinum.
2. Fáa ein einsligan út úr einseminum.
3. Hjálpa einum rúseitursjúklingi burtur úr ófærinum.
4. Fáa ein ungdóm at læra seg lidnan.
5. Geva brekaðum nýtt lívsdirvi.
6. Kenna gleðina við at gleða onnur.
7. Fáa størri fymd, sum fer at menna teg í gerandisdegnum.
8. Kenna ta kveiking, tað er at hitta kiwanis vinfólk o.s.fr.

Sosialurin 34.800

**Kiwanis Tórshavn**

Kiwanis er virkin í bygdum og býum kring allan heim. Limirnir hittast á regluligum fundum, haðani teir fáa kveiking og avstreingjast, og í nevndum útinna teir eitt sjálvboðið starv til frama fyri nærumhvørvið.

- Kiwanis er ein tænastufelagsskapur – ikki nakar felagsklubbi.
- Kiwanis er mangan ein almennur røðarapallur – men organið nakar politiskur básur.
- Kiwanis er kent fyri tað arbeiðið, tað fremur. Tað er ikki nakar loyniligur felagsskapur.
- Kiwanis stendur sum umboð fyri góðan borgaraskap. Har verður ikki trúttað niður í onnur, hvørja lívsáskoðan, tey skulu hava.
- Kiwanis miðsavnar síni tiltøk um øki og í nærumhvørvinum, har veruligur tørvur er, men hetta verður gjørt uttan at vera áleypandi.
- Kiwanis virkar fyri at veita menniskjaligum og andaligum lívsvirðum framíhjárætt fram um tey verðsligu.
- Kiwanis eggjar til gott samlag í dagligari samveru millum menniskju eftir tí gyltu regluni: "Ger ímóti øðrum tað, sum tú vilt hava onnur skulu gera ímóti tær".
- Kiwanis virkar fyri at skapa varandi vinarlag, veita ósjálvsóknar tænastur og byggja upp eitt betri samfelag fyri øll.

*Kiwanis er ein sjálvboðin felagsskapur, ið velur sjálvur sínar limir. Limaskapur stendur kvinnum og monnum í boði, sum hava gott orð á sær, og antin búgva í ella hava okkurt samfelagsligt tilknýti til tað økið, har felagsskapurin virkar.*
*Kiwanis hevur sum logo:* ***"Børnini fyrst"!***


# Staðið hart á

**– Hetta er ein sigur fyri samanhaldið millum feløgini, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*



*Hans Joensen fegnast serliga um, at samanhaldið millum feløgini hava verið so mikið gott.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag fekk ein rættiligan elddóp í nýggja sessinum. Hann gjørdist stutt síðani formaður, og nú hevur hann so staðið á odda fyri sínum felag í drúgva sáttmálastríðnum og verkfallið.

Og tað hevur ikki bara verið lætt, sigur Hans.

– Tað hevur verið eitt stórt trýst á mær. Eg havi fingið nógvar lortaspannir á meg, men eg havi breiðan rygg og standa fast, sigur Hans Joensen.

Tá vit hittu hann, beint eftir, at hann hevði sett sína undirskrift á nýggja sáttmálan, var lagið gott, og hann fegnaðist um, at samfelagið nú aftur fer at koyra sum vant.

### Gjógvin

Boðskapurin hjá Hans Joensen hevur verið, at gjógvin millum tey ófaklærdu og hini ikki skal vaksa. Fáa feløgini, sum samráðast við tað almenna meira enn arbeiðarafeløgini, so vil Havnar Arbeiðsmannafelag eisini fara eftir meira, tí gjógvin skal ikki vaksa.

Hans heldur, at lønarvøksturin væl kundi verið meira, men hetta var so tað, ið semja fekst um.

– Hetta er ein sigur fyri samanhaldið millum feløgini, sigur Hans Joensen, sum bara er styrknað, meðan verkfall hevur verið.

Arbeiðsgevararnir siga, at teir skuldu gjalda eitt loysigjald fyri alivinnuna og kendu seg sum gíslar.

– Eg kann svara, hvat teirra følilsir eru. Men eg eri valdur at gera eitt arbeiði fyri limirnar í felagnum, og tað havi eg so gjørt, sigur Hans Joensen.

# Hetta var ein harður dystur

**– Hetta var hart, men vit fingu nakað burturúr, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALLIÐ AV
*Áki Bertholdsen*



*Nýggjur sáttmáli er undirskrivaður hóskvøldið og Ingeborg Vinther og Jan Mortensen taka í hondina á hvørjum øðrum eftir ein harðan dyst*

– Hetta var ein harður dystur. Men vit fingu eisini nakað burturúr tí.

Eftir umstøðunum er Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag ikki so illa nøgd við úrslitið av samráðingunum, sum hóskvøldið førdi við sær, at verkfallið endaði.

– Vit fingu verri enn so tað, sum vit ætlaðu. Men at enda vóru bara 20 oyru á muni og tað vildi verið óráð at farið hildið fram við verkfallinum fyri 200 oyru um tíman, sigur hon.

Umframt lønarhækkingina upp á 4,30 afturat um tíman í ár og tað sama næsta ár, hava arbeiðarafeløgini fingið ymiskt nýtt við í sáttmálan um álitismannaskipanina og trivnaðin á virkjunum, um útbúgvingar, setanarskriv, starvsaldur, viðbøtur fyri starvsaldur o.s.fr.

### Ein styrkiroynd

Men hon heldur, at fingu fakfeløgini ikki tað, sum tey ætlaðu í lønarhækking, vunnu tey kortini ein sigur.

– Hetta var ein styrkiroynd og vit fingu vístu bæði arbeiðsgevarum og politisku myndugleikunum, at øll tey fimm arbeiðarafeløgini hava rygg til at standa saman, eisini tá ið harðast leikar á og tað er ein sigur fyri verkamannafjøldina, sigur Ingeborg Vinther.

Ert tú samd við arbeiðsgevararnar í, at tit tóku alivinnuna til gísla?

– Nei, tað eri eg ikki. Alivinnan var í svárum trupulleikum áðrenn nakað verkfall byrjaði og arbeiðarafeløgini hava givið alivinnuni so nógv undantøk sum hugsast kundi til at taka sjúkan fisk o.s.fr. So alivinnan hevur onki at gremja seg um.

Ingeborg Vinther gevur heldur onki fyri hóttaninar frá arbeiðsgevrum um at lønarhækkingin er so stór, at virki mugu lata aftur.

–Hatta siga teir hvørja einastu ferð, samráðingar eru. Hvørja fer, arbeiðarin fær eitt oyra upp á tímalønina fer landið á húsagang, kappingaførið rýkur og virki mugu lata aftur. Tað hevur verið sjongurin øll tey 26 árini, eg havi samráðst.

– Men hvussu ber tað so til, at tey virki, sum klára seg best, eru í teimum londum, har arbeiðsfólkið fáa góða løn, tryggleika í starvinum og trygt arbeiðsumhvørvi.

Hon hugsar er um hini norðurlondini.

– Men tað er løgið at tað sama ikki skal lata seg gera í Føroyum, sum letur seg gera aðrastaðni.

Honm sigur, at vit skulu heldur ikki gloyma, at fiskurin, sum svimur á grunnunum, er ogn Føroya Fólks og ikki hjá nøkrum fáum, einstøkum arbeiðsgevaru m.

Ingeborg Vinther heldur, at arbeiðsgevarfar skuldi heldur tikið í egnan barm og roynt at fingið virkini í tann stand, sum lógin krevur, so at arbeiðsfólki ikki verða sett í vanda, hvørja ferð, tey fóru til arbeiðis.

– Arbeiðseftirlitið hevur júst kannað virkið og úrslitið var, at 48 virki eru ikki í tí standi, sum arbeiðaraverndarlógin krevur og átta virki vórðu meldað til løgregluna.

– So har hava arbeiðsgevarar nóg mikið at tríva í, sigur Ingeborg Vinther.

Annars heldur Ingeborg Vinther ,at samráðingarnar í ár hava verið løgnar.

–Vit komu ongantíð til at samráðast um løn við arbeiðsgevaran og semingsmenninir og feløgini komu tvørt fyri beinanvegin.

– Síðani hava vit bert samráðst í nakrar tímar í trimum umførum og tað er alt ov lítið, tí tað vanliga er at sita í fleiri samdøgur út í eitt, sigur Ingeborg Vinther.

# Johan Páll er í døpurhuga

**— Eg eri rætt og slætt í døpurhuga, sigur Johan Páll Joensen, sum er stjóri á fleiri flakavirkjum. Eftir nýggja sáttmálanum við arbeiðarafeløgini hækkar lønin so nógv, at bæði flakavirkið í Hvalba og á Eiði eru í stórum vanda fyri at vera stongd**

VERKFALLIÐ AV
*Áki Bertholdsen*



*Johan Páll Joensen, vinstrumegin, stjóri á nýendurstovnaða flakavirkinum í Hvalba, og Sveinur Poulsen, skipari á Niels Paula inni á flakavirkinum í Hvalba tá ið tað læt upp beint fyri jól og alt enn sá gott út. Nú eru útlitini verri*

–Vit vórðu tiknir til gísla og kroystir til at skriva undir.

Johan Páll Joensen er ein av stóru virkiseigarunum í landinum.

Saman við øðrum eigur hann fýra flakavirki runt um í Føroyum, har tilsamans 150 fólk arbeiða.

Og hann er rættiliga í døpurhuga eftir at nýggjur sáttmáli varð undirskrivaður hóskvøldið so at fýra viku langa verkfallið endaði.

–Arbeiðarafeløgini tóku alivinnuna til gísla í samráðingunum. Har mátti virksemið takast uppaftur nú og tí vóru vit heilt einfalt noyddir at skriva undir sáttmálan, hóast lønarhækkingin er alt ov stór, sigur Johan Páll Joensen.

Men hann er næstan vísur í, at lønarhækkingin fer at fáa álvarsligar avleiðingar og tí er hann rætt og slætt í døpurhuga, sigur hann.

Hann hevur virki í Klaksvík, á Eiði, í Sørvági og í Hvalba.

– Bæði virkið á Eiði og tað í Hvalba ganga við undirskoti og spurningurin er, hvussu verður vorðið við teimum.

Johan Páll Joensen sigur, at ein avleiðing av lønarhækkingini kann verða, at hesi bæði virkini als ikki lata uppaftur, ella stongja aftur heilt skjótt.

Hann leggur dent á, at hetta er ikki sagt fyri at hevna seg ella fyri at loypa rædslu á tey, sum arbeiða har.

–Vandin fyri hesum báðum virkjunum er veruligur og heilt álvarsligur, sigur hann.

Hann sigur, at hann ætlar ikki at koma í eina støðu, har virkini ikki klára at svara hvørjum sítt.

– So skal lykilin heldur snarast beinanvegin, sigur hann.

Hann sigur, at virkið í Hvalba og tað á Eiði hava einar 135.000 arbeiðstímar um árið og lønarhækkingin fer sostatt at føra við sær, at lønarútreiðslurnar hjá hvørjum virki økjast meiri enn eina hálva millión um árið. Í Sørvági og í Klaksvík er tað nakað minni.

– Virkið í Hvalba er nýliga latið uppaftur. Vit hava arbeitt teir fyrstu mánaðirnar í ár við undirskoti, men tað høvdu vit vænta.

– Men nú liggur virkið stilt ein heilan mánaða afturat av verkfallið, samstundis sum lønarútreiðslurnar økjast munandi. Og tað skal heldur ikki gloymast, at um ein mánað er summarfrí og tá skal virkið kanska longu stongjast aftur.

Tað sama er so galdandi fyri virkið á Eiði, tí eisini har er undirskot frammanundan.

Hann sigur, at hann fer at brúka komandu dagarnar til at umhugsa støðuna gjølliga.

– Spurningurin er, um vit skulu binda um heilan fingur og lata virkini aftur. Ella um vit skulu lata uppaftur og so hava opið í alt summar, uttan at fara í feriu, ella um vit skulu koyra á sum upprunaliga ætlað. Tað veit eg ikki nú, men tað er greitt, at virkið á Eiði og í Hvalba eru á vippuni, sigur Johan Páll.

### Ikki tiknir í álvara

Joahn Páll Joensen sigur, at eitt er at lønarhækkingin hóttir við at taka grundarlagið undan fleiri virkjum.

Eitt annað er tann ruðulleiki, sum verkfallið hevur ført við sær á marknaðunum, sum vit selja fiskin á.

–Vit hava havt sølufólk niðri í Evropu og roynt at fáa keyparar at keypa okkara fisk. Men nú vit skulu levera, fáa vit ikki levera, tí tað hevur verið verkfall.

Kanska koma vit eisini at liggja lamnir í summar vegna summarfrí.

Hann sigur, at í gjár vóru sølufólk hjá teimum eisini úti um seg á marknaðunum í Evropa.

– Men tey greiðu boðini, vit fáa frá keyparunum, eru, at føroyingar kunnu ikki takast í álvara sum seljarar, tí vit fáa ikki levera, tá ið keypararnir vilja hava fiskin, og so loypa teir frá.

Avleiðingin av tí er, at virkini hjá Johan Páll Joensen heilt ítøkiligt hava mist sølusáttmálar, sum teir annars høvdu fingið.

–Og so er tað eisini steinur oman á byrðu, at føroysk

Framhald á síðu 11






*Aftan fyri Bjarna Djurholm mæla hjólini aftur, men landsstýrismaðurin við arbeiðsmarknaðarmálum heldur, at tíðin er komin at gera broytingar í viðurskiftunum, so landið sleppur undan at hava heimsmet í verkføllum*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Verkfallið avdúkar veikleikar

**Longu í næstu viku fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við arbeiðsmarknaðarmá lum, at biða um grønt ljós frá landsstýrinum at fara undir víðfevndar broytingar í viðurskiftunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hetta er eitt viðkvæmt politiskt evni, viðgongur hann, men verkfallið man hava víst øllum, at skipanin er ótíðarhóskandi**

EFTIRMETING
*Ingi Rasmussen*

»Verkfallið hevur lært meg ikki so lítið.«

Bjarni Djurholm er landsstýrismaður við arbeiðsmarknaðarmálum. Og okkurt er heilt galið á hansara málsøki. Síðstu árini hava verkføll meira verið reglan enn undantakið, og verkfalsdagarnir í Føroyum eru fleirfaldaðir samanborið við grannalond. Eftir ein heilan mánað við verkfalli og kaotiskum viðurskiftum hjá vinnu og fólkum flest, er tíðin komin at eftirmeta og síðan fara undir nakrar broytingar.

– Vit mugu øll hava lært, at lógargrundarlagið undir viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum er ótíðarhóskandi, sigur Bjarni Djurholm.

### Avoldað seming

Talan er um fleiri viðurskifti, og tá landsstýrismaðurin hevur tosað seg heitan, fær hann ikki afturhald.

Eitt er lógin um seming, sum er ófullfíggjað. Tað er kanska ikki so løgið, tí hon er ikki dagførd síðan í 1920-árunum. Landsstýrismaðurin kundi hugsað sær eina skipan, sum líktist henni í grannalondunum, har semingsmenninir fáa fleiri heimildir og møguleikar at trýsta partarnar í sínum semingsroyndum.

Verkfallið byrjaði, tí arbeiðarafeløgini havnaðu fyrsta semingsuppskotið, sum ljóðaði upp á 3,20 krónur omaná tímalønina um árið. Tá samanumkom gav tað bara verkafeløgunum 1,10 krónur meira at vera í verkfalli í ein heilan mánað. Spurningurin er, um tað ikki kundi loyst seg betur við maratonsamráðingum beinanvegin.

– Aðrastaðni kunnu semingsmenninir útseta eitt møguligt verkfall í tvær ferðir 14 dagar. Í Føroyum er hesin møguleikin avmarkaður til eina viku. Høvdu vit havt tann møguleikan at útsett verkfallið í ein mánað, kundu vit helst nátt sama úrslit uttan verkfall. Tað er tankavekjandi, sigur Bjarni Djurholm.

Eitt annað, sum landsstýrismaðurin kundi hugsað sær, er at gera skipanir, sum sleppa ávísum økjum undan verkfalli. Hann hugsar um eitt nú alivinnuna, har sjúkur eru lívshóttandi fyri tilverugrundarlagið.

– Vit mugu gera skipanir, har tað ber til at gera undantøk. Til dømis skal tað bera til at fylgja krøvum frá djóralæknum, sum byggja á millumtjóða veterineravtalur. Spurningurin er, um tað yvirhøvur skal bera til at raka ávísar vinnugreinar, tá tað er hóttafall, sigur Bjarni Djurholm.

### Bukett av broytingum

Yvirhøvur eftirlýsir landsstýrismaðurin eini smidligari skipan á arbeiðsmarknaðinum. Talan skal vera um eina bukett av uppskotum og tillagingum, ið hava til endamáls at gera tað léttari at semjast uttan buldur og brak. Skandinaviski frymilin er fyrimyndin.

Tað skal vera torførari at fara í eitt verkfall, sum skal lýsast í góðari tíð. Tað uppskotið hevur ikki verið møtt við vælvild, og í bukettini hjá Bjarna er eisini eitt tað viðkvæmasta økið yvirhøvur: Arbeiðsrætturin! Eitt orð, sum fær tað at renna kalt niður eftir rygginum á fakfelagsfólkum.

– Eg veit væl, at hetta eru prinsippøki hjá fakfeløgunum, men vit noyðast at sleppa okkum burtur úr fastlæstum hugsanum. Tað er neyðugt við einum arbeiðsrætti, sum kann arbeiða skjótt og loysa ósemjur eftir stuttari tíð, so tað slepst undan áralongum ósemjum, sigur Bjarni Djurholm.

Hann fer longu í næstu viku at biða sínar samgongufelagar um loyvi at fara undir at broyta viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum. Fleiri av uppskotunum hevur hann longu liggjandi, men hann veit, at tað er ongin løtt uppgáva.

– Eg veit, at higartil hava politisku flokkarnir hvept seg við at nortið økið, tí trýstið hevur verið stórt frá verkafeløgunum. Men hetta síðsta verkfallið átti at víst øllum, eisini flokkunum í andstøðu, at vit mugu gera okkurt, áðrenn søgan endurtekur seg, sigur Bjarni Djurholm.

### Á annan bógv

Tað slepst ikki undan at koma inn á politiska atgerðarloysi í sambandi við verkfallið. Spurdur, um politikarar hugsa meira um atkvøðurnar til næsta val enn at loysa trupulleikan, viðgongur hann, at tað er eitt problem.

– Seinast eg sendi hesi uppskot til hoyringar fyri tveimum árum síðan, sendu fakfeløgini tinglimum brævl, har tey mintu á, at teir skulu veljast aftur fjórða hvørt ár. Tað er fullkomiliga avsporað. Eg havi einki ynski yvirhøvur um at gera støðuna hjá fakfeløgum verri. Eg hava bara sett mær fyri at gera lóggávuna meiri tíðarhóskandi, og hon skal sjálvandi liva upp til nøkur krøv, ið tey hava. Tað ræður um at fata fakfeløgini sum viðspælara heldur enn mótpart, sigur Bjarni Djurholm.

Í allari neyðini leggur landsstýrismaðurin stóran dent á, at føroyski arbeiðsmarknaðurin ikki bara er verri fyri enn aðrir.

– Vit hava nógvar sterkar síður. Arbeiðsmarknaðurin er fleksibul, fakmørkini eru fá, arbeiðsmegin er mobil, og arbeiðsgevarafeløgini eru fá. Arbeiðsloysisskipanin er smidlig og barsilsskipanin er góð. Tað eru bara nøkur øki, sum eru afturútsigld, og nú er tímin komin til teirra, sigur hann.

Tá samanum kemur, er størsti trupulleikin kortini, at partarnir hava skeivan hugburð til hvønn annan. Kemiin er ov vánalig, sum fleiri hava ført fram.

– Tað skulu tveir partar fyri at klandrast, men tað skal bara ein partur til at finna eina semju. Vit mugu bara staðfesta, at báðir partar hava verið ógvuliga trekir móti hvørjum øðrum, og at samskifti millum arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar, eisini teir almennu, hevur verið út av lagi vánaligt í áravís. Tað er høvuðsorsøkin til, at vit hava konstantar ósemjur, sigur Bjarni Djurholm.

## DAGSINS MEINING

# Bitland

Føroyar skulu verða royndarland hjá teimum stóru teldufyritøkunum. Hetta er málið, sum verkætlanin *Bitland* hevur sett sær. Tað eru Føroya Tele, Føroya Sparikassi, Atlsantic Airways, Agip, Sansir og TK-stovan, sum standa aftan fyri hesa áhugaverdu verkætlan. Hugsjónin er, at Føroyar sum eitt lítið land eru vælhóskandi at royna nýggjar telduskipanir. Her eru stórir møguleikar og áhugaverd arbeiðspláss í eygsjón.

Tá hugsað verður um, at útbúgvingarstøðið í Føroyum er høgt og føroyskar fyritøkur, einstaklingar og skúlaungdómur eru sera væl fyri, tá tað snýr seg um KT, so skuldu góðar fortreytir verið fyri eini slíkari verkætlan. Afturat hesum kemur, at fleiri føroyskar teldufyritøkur hava megnað at gera seg galdandi í beinhørðu kappingini uttanlanda. So her er avgjørt nakað at byggja á og ivaleyst eisini eitt øki við stórum menningarmøguleikum.Verkætlann hevur sum fortreyt, at føroyskar fyritøkur fara at samstarva í størri mun enn í dag, og hetta er í sjálvum sær nakað av eini mennandi avbjóðing.

Tað hevur mangan verið tosað um at finna alternativar vinnur til fiskivinnuna. Tað ræður um hjá okkum at finna nisjur, har vit kunnu troyta og gagnnýta tað menniskjansliga tilfeingi, ið er í landinum, nevniliga tað vælútbúgvna fólkið. Í Føroyum eru nú fleiri teldufyritøkur við sera duganligum fólki og við leiðslum, ið bæði hava hugflog, áræði og dirvi. Hesar fyritøkur dúva sjálvsagt mest upp á heimamarknaðin, men nú er so eitt gott høvi at vinna sær eina rók á altjóða marknaðum.

Við verkætlanini Bitland ber til at fáa vinnuligt samstarv ið tær leiðandi stórfyritøkurnar á altjóða marknaðinum, eitt nú Intel, ið hevur sýnt Føroyum stóran áhuga. Tað ræður um at koma á listan hjá World Economic Forum (WEF), ið lýsir hvar á menningarstiganum eitt land er statt. Norðurlond er høgt á hesum stiga. Tá vit samstundis hugsa um, at Føroyar ikki standa aftan fyri grannalondini á hesum øki, skuldu útlitni verið sera góð at sloppið uppí. Vit vóna, at Bitland-verkætlanin fer at eydnast væl og spennandi verður at fylgja við menningini og teimum tiltøkum, ið verða hetta til heystar. Vónandi vera útlendskar fyritøkur "bitnar" av Bitlandverkætlanini, tí tað er bit í hesi ætlan, sum onkur málbar seg. Vit fara heilt víst at venda aftur til hesa áhugaverdu verkætlan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Dýrt verkfall

**Bárður Nielsen**
*løgtingsmaður*



Endiliga eydnaðist at fáa semju millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, og hvat er so fingið burturúr. Lønin hækkaði við kr. 4,30 í ár og aftur 4,30 næsta ár og um lønin hækkaði við kr. 3,20 høvdu vit sloppið undan einum verkfallið og gevur hendan kr. 1,10 fyri ein arbeiðara kr. 1.980 um árið og munar hetta ikki nógv í mun til hvat hann hevur mist undir verkfallinum. Arbeiðarafeløgini hava undir verkfallinum goldið 70% av sáttmálalønini svarandi til at ein arbeiðari, ið arbeiðir fulla tíð, hevur fingið kr. 2.581,60 í mun til kr. 3.688,- um vikuna og tá verkfallið hevur vart í fyra vikur svarar tað til, at hann hevur fingið kr. 4.425,60 minni í løn, so arbeiðast má leingi fyri at vinnað hetta innaftur og serliga hjá teimum, ið fáa meira enn sáttmálalønin ásetur.

Tað eru fleiri, ið hava brúkt sína frítíðarløn undir verkfallinum og er hetta ikki serliga hugaligt um tey høvdu ætlað sær eina summarfrítíð fyri tann pengingin, so fyri mong man tað verða trupult, at síggja hvørjar batar verkfallið hevur havt við sær.

Arbeiðarafeløgini hava uppløst, at tað hava verið um 12.000 limir í verkfallið og um vit siga at tað svarar til 6.000 fulltíðar størv og hesi hava fingið 70% frá arbeiðarafeløginum, so hava arbeiðarafeløgini útgoldið góðar 15 mió. um vikuna ella umleið 60 mió. í lønum til limirnar undir verkfallinum og tað má sigast at hava verið dðrt fyri verkafeløgini.

Samfelagið er nokk størsti taparin í einum verkfallið og tað gongur nokk long tíð áðrenn vinnan og Føroyski búskapurin vinnur sítt tap innaftur, tí tað eru bæði kontraktir og álitið annars sum hevur fingið ein frammaná av hesum verkfallinum, hetta er eitt tekin um eitt óstabilt samfelag, ið okkara samstarvspartnarar als ikki skilja.

Nú er verkfallið so av og vit mugu síggja frameftir og fara aftur til arbeiðis, men eg meti at tað er neyðugt at broyta skipanina á arbeiðsmarknaðinum. Tað kann ikki verða meiningin, at vit skulu út í eitt verkfall annaðhvørt ár fyri at fáa semju, hetta er nokk besta prógvi um at verandi skipan ikki er góð nokk.

# Stórt blað mikudagin

Verkfallið hevur eisini merkt bløðini, sum eru komin í skerdum síðutali. Nú kemur alt í trygga legu aftur og leggja vit út aftur mikudagin við einum stórum blað, har lýsingatorgið verður við aftur og har vit m.a. hava stóra reportasju um Íslandsdystin umframt at hava nógva umrøðu av aldarinnar dysti móti Týsklandi

**Blaðstjórin**

# Ráðstevnan »Kvinnur sum leiðarar« fullteknað

TÍÐINDASKRIV

Ráðstevnan "Kvinnur sum leiðarar" við m.a. luttøku av Pernille Aalund, er fullteknað. Bert tríggjar dagar eftir at heimasíðan www.olivant.fo/radstevna var almannakunngjørd, varð fult hús. Eini 60-70 fólk standa á bíðilista.

Fyrireikarnir eru sera fegnir um tann ovurhondstóra áhugan.

Ráðstevnan verður komandi fríggjadag 13. juni 2003 í Gamla Meiarínum, í hølunum hjá Leikhúsinum Gríma. Umframt Pernille Aalund verður eisini høvi at hoyra innlegg hjá Joan Petersen, Andras Róin og fleiri føroyskum kvinnum.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tí stóra skara, sum á so ymiskan hátt sýndi samkenslu og hjálpti til, tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Óli Frits Johannessen**
Húsavík

doyði og varð jarðaður.

Vit hava verið borin á hondum av vælvild og hjálpsemi.
Guð signi tykkum øll.

*Fyri tey avvarðandi*
**Ásleyg, Kristina, Marin og Tórhild**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



Løgmaður um semjuna á arbeiðsmarknaðinum:

# Bakkast fyri føroyskan búskap og útflutning

**-Tað finnast bara taparar eftir, at verkfallið er av. Vit eiga at læra av hesum. Tað er ikki nakað, sum er vert at endurtaka sigur løgmaður. Hann vísir á, at tað skulu nógvar góðar kreftir medvirka til, at skipanin á arbeiðsmarknaðinum verður broytt**

VERKFALLIÐ AV
*Jan Müller*



*Løgmaður um semjuna á arbeiðsmarknaðinum: -Hon kann hava við sær økta inflatión, sum útholar lønarhækkingina, men verri er, at vit hava fingið eitt verri kappingarføri soleiðis at vit ikki fáa arbeiði til allar hendur í Føroyum. Tað er tann størsta vanlukkan.*

Nú verkfallið er av heldur løgmaður, at tað var rætt av politikarunum ikki at leggja seg út í ósemjuna.

-Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum hava skyldurnar og ábyrgdina av, at vit hava ein tryggan og góðan arbeiðsmarknað. Tí var tað teirra uppgáva at finna eina loysn.

-Tú hevur sjálvur sagt, at kom tað hartil, at stór samfelagsvirði stóðu uppá spæl, so fór tú at leggja uppí. Tað valdi tú so ikki at gera kortini!

-Tað veldst um, hvat man meinar við tá tosað verður um stór samfelagsvirði.

-Tú metir ikki, at tú og landsstýrið hava víst ábyrgdarloysi við at lata landið liggja lamið í ein heilan mánað?

-Nú hevur man í ein mánað hoyrt, at man skal ikki blanda seg, og tí kann tað virka løgið, tá spurt verður, hví man skuldi havt blandað seg. Skal man ikki lata nøkur virði fara fyri skeyti í eini støðu sum hesi, so er tað ein heilt onnur lóggáva og skipan, sum vit skulu hava sigur løgmaður, sum ger greitt, at tað eru farin ómetaliga stór virði fyri skeyti og arbeiðspláss og upparbeidd marknaðaratgongd hava fingið eitt skot fyri bógvin.

Løgmaður vísir á, at eru vit ov skjót úti frá politiskari síðu, tá frátekur man ta ábyrgd frá teimum pørtum, sum hava henda rætt í dag. Tað er ein avvegan, men tað er greitt, at støðan er ógvuliga darvandi fyri Føroyar.

-Hetta er ein skrúva uttan enda, sum ikki hevur nakað positivt árin á føroyska búskap.

### Einki stendur í stað

-Nú hevur tú hildið teg fast til verandi skipan og roynt at vera loyalur yvir fyri henni. Samtíðis hevur tú sagt, at henda skipan má broytast, so støðan ikki endurtekur seg. Hvat fer tú at gera?

-Tá tú hevur eina skipan um seming frá 1926, og partarnir samtíðis siga, at tann skipanin kann als ikki brúkast, m.a. ber ikki til at brúka skipanina um ur-atkvøðu, tí hon skal vera ódemokratisk, so hongur hetta als ikki saman. Einki stendur í stað. Tingini útvikla seg alla tíðina. Vit vita, at skipanir í londunum rundan um okkum eru nakrar heilt aðrar enn tær vit hava. Síðani er tað markamótið millum veterinerlóggávu, djóraverndarlóg og annað í eini verkfalsstøðu. Tú gevur landsdjóralæknanum nakrar heimildir at kunna áleggja alibrúkum samtíðis sum tú hevur aðra lóggávu, sum sigur, at alibrúkini kunnu ikki fylgja upp lógini, tí tey av øðrum orsøkum koma í eina tvístøðu, sum eitt verkfall hevur við sær . Slíkt mugu vit fáa uppá pláss.

Anfinn Kallsberg sigur, at tað er vinnumálaráðharrin, sum hevur ábyrgdina av bæði vinnuni og arbeiðsmarknaðinum. –Vit hava tosað um hetta, og eg veit, at hann er farin í gongd við at finna eina nýggja skipan.

-Fakfeløgini vilja ikki hava nakrar stórar broytingar, sum m.a. hava við sær gerðarætt ol!

-Arbeiðarafeløgini hava víst á eina semingslóg, sum tey sjálvi siga seg vera ímóti og sum ikki kann brúkast til nakað sum helst. Man kann ikki bæði vera ímóti og fyri. Eg skilji ikki, hví man ikki vil hava skipað viðurskifti, soleiðis at man kann loysa eina konflikt væl og virðiliga og ikki sum í hesum førinum sita í fýra vikur og kanska bara bíða eftir hvørjum øðrum. Tað er ikki brúkbart í einum nútíðarsamfelag sum tí føroyska við tí sárbæri, at vit hava eina vinnu, sum er bundin av einum útflutningi og har vit skulu kappast við aðrar.

-Nógv vinnulívsfólk halda tað vera púra ábyrgdarleyst av tær sum løgmanni at standa og hyggja at og ikki fyri langari tíð síðani at hava forðar fyri, at samfelagið kann verða lagt lamið í ein heilan mánað?

-Eg skilji væl ta støðutakanina. Tað er neyvan møguligt at fáa eitt nýmótans vinnulív, ið skal gera sær nakrar tankar um at vinna í kappingini, sum er á marknaðinum í dag, um man ikki hevur tey neyðugu amboðini. Eg skal vera tann fyrsti at ásanna, at vit hava tey ikki. Tað er jú uppgávan hjá okkum politikarum at syrgja fyri, at vinnan hevur so tryggar karmar at arbeiða undir og harundir eisini viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum.

Løgmaður ásannar og tað heldur hann eisini andstøðan ger, at tað eru nøkur viðurskifti, sum ikki hanga saman og sum nakað má gerast við nú.

-Tað verður víst á, at vit fáa ikki broytt skipanina, tí politikarar í nógvum av flokkunum tora ikki at ganga ímóti fakfeløgunum av ótta fyri at missa atkvøður.

-Tað verður sagt, og at nakað er um tað skal eg ikki vísa aftur. Men hinvegin mugu politikarar hava rygg til at gera nakrar fastar karmar soleiðis at tað ikki bara er tilvildin, sum ræður. Tað er sanniliga í áhuganum hjá øllum, bæði arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum og samfelag, at vit ikki fáa eitt afturstig. Tað er tó júst tað vit fáa við slíkum verkfalli, har eingin vinnari er. Tað eru bara taparar og stórir taparar, og tað kemur at ganga út yvir alt Føroya fólk.

### Munur á

-Tað hevur verið funnist at tær sum løgmanni bara at samskifta við partarnar gjøgnum fjølmiðlarnar og at tú hevur gjørt ov lítið fyri at fáa semingsmenninar at halda fram við semingini.

-Atli Dam hevur eina aðra áskoðan enn eg í hesum málinum. Hann hevur kanska eisini í síni tíð havt eitt tætt samskifti við partarnar á arbeiðsmarknaðinum og hevur entá eisini í samráð við teir í nøkrum førum borið uppskot niðan í tingið at fáa lagt upp í eitt verkfall. Men um eg var farin inn í málið og sagt, at eg skuldi royna semju, so hevði eg tikið ábyrgdina frá fólkunum, sum skulu finna eina semju og latið hana yvir til politikararnar. Og so hevði henda trætan ikki verið loyst millum partarnar og varð kanska endað í tinginum.

Løgmaður heldur sjálvur, at tað er ikki mátin at loysa allar trætur við eini løgtingslóg. Tað, sum alt hetta samfelagið eigur at byggja á á øllum stigum er, at avgerð og ábyrgd fylgist. Tað er eisini galdandi fyri fakfeløgini.

### Bakkast

Hvat heldur løgmaður so um úrslitið av samráðingunum?

Tað vil hann ikki gera viðmerkingar til sum so men hann viðgongur, at tað er eitt bakkast fyri føroyskan búskap og útflutning.

-Men er tað veruliga eitt bakkast, at tey fólkini, sum eru við til at skapa virðini, fáa eina rímuliga løn fyri arbeiðið?

-Tað er ikki ein spurningur um, hvat er rímuligt og ikki. Eg havi sjálvur eitt heitt hjarta fyri, at Føroya fólk hava ein so høgan livistandard sum møguligt, men tað er ikki trupulleikin. Hann er tann, at tingini eru ikki so einføld, at tey hanga saman. Vandin í slíkari støðu er, at tú fær eina uppskrúvan av bruttolønarlagnum í Føroyum, harvið eina økta inflatión og harvið eitt minkandi kappingarføri hjá tí føroyska samfelagnum. Men eg eri ikki vísur í, at tey, sum í dag halda seg hava vunnið ein sigur við lønarhækkingini, vera tey, sum hava fingið nakað burtur úr. Tí semjan kann hava við sær, at ein økt inflatión útholar lønarhækkingina, men tað sum er verri er, at vit hava fingið eitt verri kappingarføri soleiðis at vit ikki fáa arbeiði til allar hendur í Føroyum. Tað er tann størsta vanlukkan.

*-Men er tú ikki samdur við formannin í Havnar Arbeiðsmannafelag um, at arbeiðararnir hava eins góðan rætt til ágóðarnar og at tað skal fara ein útjavning fram?*

-Tað er væl tað, sum øll tann politiska skipanin snýr seg um. Vit hava útjavning av øllum slag. Skattastigin er progressivur, og tað er so sanniliga ein útjavning í tí. Men vit mugu eisini gera nakað við, at tað skal loysa seg at gera ein innsats. Nú skal tað ikki skiljast sum, at tey ófaklærdu ikki gera tað. Tí tað gera tey hvønn dag. Men munurin í lønarlagnum, sum hevur verið og sum kemur at vera, verður eisini gradueraður eftir, hvat hevur man gjørt á útbúgvingarøkinum osfr.

Tá formaðurin í HA sigur, at kluftin skal minka, kann eg bara siga, at hon er sanniliga minkað, um tú hyggur at hesum í prosentum men ikki í krónum. Tað er klárt, at fleiri krónur koma í lønarposan. Skal tað vera sami prosentsatsur, so veksur kluftin í krónum. Men veksur hon ikki í krónum, so minkar hon í prosentum. Og tað er tað hon hevur gjørt í fleiri ár.

-Men mong eru samd um, at tey, sum arbeiða á flakavirkjunum, fáa ov lítið í løn?

-Tað eri eg ikki ósamdur í. Trupulleikin er bara tann, at tað er eingin móttakari at senda tað økta lønarkravið, sum kemur á okkara útflutningvørur. Vit síggja í londunum rundan um okkum, sum hava eitt hægri lønarlag enn vit, t.d. í Noregi og Danmark – har verða hvønn dag hundraðtals arbeiðspláss flutt til m.a. eystureuropeisk lond, tí tey vinna í kappingini. Tað er tann støðan vit skulu taka við, tá vit tosa um kappingarføri.

Løgmaður heldur annars, at støði við hesum samráðingunum er lagt fyri almenna arbeiðsmarknaðin.

---

*Framhald av síðu 8*

skip hava avreitt uttanlands í ein heilan mánað fyri spottprís í mongum førum. Allan hendan fiskin frá teimum føroysku skipunum, fara tey útlendsku virkini nú at brúka í kappingini ímóti tí føroyska fiskinum, sum vit skulu royna at selja nú verkfallið er av. Hetta ger tað serliga trupult at koma inn aftur á marknaðinum, ikki minst tá ið hugsað verður um, hvussu bíliga tey útlendsku virkini fingu fiskin.

– Johan Páll Joensen sigur, at hetta verður ein trupulleiki, sum føroyskir útflytarar koma at dragast við leingi afturat og alt hetta verður sjálvandi tikið við í metingunum, tá ið framtíðin hjá virkjunum í Hvalba og á Eiði skal avgerast.

### Ber ikki til

Hann sigur, at allir partar á arbeiðsmarknaðinum mugu nú seta seg saman at finna mannagongdir, so at hetta ikki kemur fyri aftur.

– Føroyska samfelagið er ógvuliga bundið at útlendskum marknaðum og av at kunna levera fisk frá viku til viku, og tað kann heilt einfalt ikki virka, skal tað verða lagt lamið í vikur at kalla hvørt einasta ár og tí er neyðugt at broyta mannagongdirnar so at tað ikki kemur fyri aftur.

Hvussu tað kann gerast, veit hann ikki, men hann tvíheldur um, at hetta má raðfestast ógvuliga høgt í komandi tíðum.

– Tað hevði tænt áhugamálunum hjá okkum øllum. Arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar eru øll í sama báti, so tað sum ávirkar annan partin, ávirkar eisini hin partin. Og tað er heilt hopleyst, at tað skal bera til hjá arbeiðarafeløgum ella arbeiðsgevarum at leggja landið lamið í ein heilan mánað. Tað er ikki tí at eg ikki vil, at arbeiðsfólk skulu hava sína løn, men arbeiðsmarknaðurin má skipast betri, sigur Johan Páll Joensen.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men møguliga okkurt ælið seinnapartin. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið Hvítusunnudag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið 2. Hvítusunnudag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn, men mikudagin kemur hann av útsynningi og ælingur. men eisini sólglottar. Hitin báðar dagar millum 8 olg 12 stig.

## Til arbeiðis




So var verkfallið av fyri hesaferð

# Nótaskipini í íslendskum sjógvi

**Atli Hansen, reiðari, metir, at eini 40.000-50.000 tons av svartkjafti høvdu verið løgd upp til Havsbrún í Fuglafirði seinastu fýra vikurnar, um verkfall ikki hevði verið**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Føroysku nótaskipini, Tróndur í Gøtu, Christian í Grótinum, Krúnborg, Jupiter og Høgaberg, eru øll á svartkjaftaveiði í íslendskum sjógvi.

Atli Hansen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin er góður, og at skipini gera ein túr um vikuna ella so.

Skipini hava fylgt svartkjaftinum, sum er komin av leiðunum vestanfyri Írland, norður í føroyskan sjógv, og nú seinastu tríggjar vikurnar hevur mest verið tað fingið í íslendskum sjógvi.

Atli Hansen sigur, at vanliga gongdin hjá svartkjaftinum er, at hann blívur burtur í føroyskum sjógvi umleið 20 mai og tekur seg síðan uppaftur í íslendskum sjógvi.

– Um mánaðarskiftið juli/august plagar hann at standa um markið millum Føroyar og Ísland á veg norðureftir. Út á heystið vendur fiskurin suðureftir aftur, til hann gýtir vestanfyri Írland móti vári.

Reiðarin sigur, at nú verkfall hevur verið, og Havsbrún ikki hevur tikið ímóti fiski, hava føroysku nótaskipini landað veiðina í Íslandi. Tann eina túrin landaðu tey í Noregi, men hóast prísurin har var eini 4–5 oyru hægri enn í Íslandi, loysti tað seg ikki, tí siglingarleiðin er longri.

Atli Hansen metir, at eini 40.000-50.000 tons høvdu verið løgd upp til Havsbrún í Fuglafirði seinastu fýra vikurnar, um vit ikki høvdu havt verkfall.



*Íslendski báturin, Jón Kjartanson, í føroyskum sjógvi.*

*Mynd: Edvard Joensen*

## ÚF Morgunlestrar
**10.–14. juni**

***Thorben Johannesen, prestur, lesur***

**Sálmar:**

Týsdagin 10. juni:
nr. 229 Nú skínur sól í dýrd og mæti

Mikudagin 11. juni:
nr. 227 Jesu halga boð í minni
nr. 230 Hægstur heilagur andi

Hósdagin 12. juni:
nr. 234 Sannleikans andi
nr. 333 Frið sum troyst í sakni ber

Fríggjadagin 13. juni:
nr. 336 Kom, sannleiks andi, vitni ber
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arvagóðs

Leygardagin 14. juni:
nr. 231 Vit halgan anda biðja nú
nr. 237 Andanna andi












**Vika 23 – 4. juni**
Vinnaratøl: **06 - 33 - 39 - 40 - 43 - 44**

Eykatøl: **03 - 18**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | 8.249.221,- kr. |
| 5 vinnarat.+ eykatal | 136.057,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 4.693,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 139,- kr. |
| 3 vinnaratøl: | 43,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juni: Fyrra kvarter
12. juni: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juni | 00.37 | 13.12 | — | 12.12 | — | 12.27 | 02.37 | 15.12 | 03.37 | 16.12 | 11.27 | — |
| 8. juni | 01.47 | 14.22 | 00.47 | 13.22 | 01.02 | 13.37 | 03.47 | 16.22 | 04.47 | 17.22 | 00.02 | 12.37 |
| 9. juni | 02.57 | 15.19 | 01.57 | 14.19 | 02.12 | 14.34 | 04.57 | 17.19 | 05.57 | 18.19 | 01.12 | 13.34 |
| 10. juni | 03.41 | 16.03 | 02.41 | 15.03 | 02.56 | 15.18 | 05.41 | 18.03 | 06.41 | 19.03 | 01.56 | 14.18 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juni | 10.27 | 23.02 | 00.52 | 13.27 | 01.52 | 14.27 | 00.22 | 12.57 | 01.37 | 14.12 |
| 8. juni | 11.37 | — | 02.02 | 14.37 | 03.02 | 15.37 | 01.32 | 14.07 | 02.47 | 15.22 |
| 9. juni | 00.12 | 12.34 | 03.12 | 15.34 | 04.12 | 16.34 | 02.42 | 15.04 | 03.57 | 16.19 |
| 10. juni | 00.56 | 13.18 | 03.56 | 16.18 | 04.56 | 17.18 | 03.26 | 15.48 | 04.41 | 17.03 |

5 707265 100067 >